


*Rúni Petersen, verkætlanarleiðari hjá JT electric – og ein av sjómonnunum úr kendu sendirøðini, Deadliest Catch*

# Deadliest Catch vitjaði føroyska fyritøku í USA

**SEATTLE - Tað var stuttligt at hitta ein av sjómonnunum úr kendu sendirøðini, Deadliest Catch, men hetta var meiri sum at hitta eina poppstjørnu enn ein fiskimann, sigur Rúni Petersen hjá JT electric**

Vilmund Jacobsen

Tá fyritøkan JT electric á Kambsdali í november var við framsýningini Pacific Marine Expo í Seattle, hevði felagið bás saman við amerikanska felagnum, Harris Electric, ið er ein umleið sjeyti ára gomul fyritøka á sínum øki í USA.

Orsøkin til, at hesi bæði feløguni vóru á bási saman, er, at Harris Electric umboðar trolkameraið hjá JT electric í økinum og veitir neyðuga tænastu í hesum sambandi.

Í grein á blaðsíðu 10 og 11 í dag er meiri at lesa um hesa stevnu, og hvussu hon vignaðist hjá fyritøkuni á Kambsdali.

Á framsýningini í Seattle legði JT electric serligan dent á trolkameraið, sum felagið hevur ment og hevur selt, bæði í Evropa og USA.

Ein av størstu kundunum hjá JT electric er nevniliga American Seafood Compagny, sum hevur keypt og bílagt fimm trolkamera.

## Kend andlit

Rúni Petersen, sum er verkætlanarleiðari og stendur fyri søluni av trolkameranum, var saman við Sofusi Gregersen, marknaðarleiðara hjá JT electric, á framsýningini í Seattle.

Ein av døgunum fingu teir vitjan av einum kendu andliti, nevniliga einum av sjómonnunum, sum eru við í kendu og vælumtóktu sendinginí á Discovery, Deadliest Catch.

Rúni Petersen, sum er avmyndaður saman við hesum manni, sigur, at hann kom at vitja menninar á básinum hjá Harris Electric.

> **… eg skilti, at teir kendust og at skipið, sum hann er við, hevur Harris Electric sum veitara til ymiska útgerð…**
>
> RÚNI PETERSEN

- Eg skilti, at teir kendust og at skipið, sum hann er við, hevur Harris Electric sum veitara til ymiska útgerð.

Hann sigur, at teir prátaðu ikki tað heilt stóra saman.

- Men tað var kortini stuttligt at hitta ein av hesum sjómonnunum úr kendu sendirøðini.

Rúni Petersen sigur, at teir, sum eru við í hesi sending, helst meiri at kalla eru kendir sum stjørnir enn fiskimenn.

- Hetta var meiri sum at hitta eina poppstjørnu enn ein fiskimann, leggur verkætlanarleiðarin hjá JT electric aftrat.

## Góð undirtøka

Rúni Petersen sigur, at honum kunnugt er einki aktuelt um, at hesir djørvu fiskimennir úr Beringshavinum ætla at útvega sær trolkameraið hjá fyritøkuni á Kambsdali.

- Men nú fáa vit at síggja. Teir kenna Harris Electric, og tað eru teir, sum umboða okkum í hesum økinum, leggur hann aftrat.

vilmund@sosialurin.fo